




# Grafikari við stórum G

**Halt á! Fyri Guds skyld, halt áfram Marius!, bønar Kinna Poulsen í ummæli av framsýning hjá grafikar-anum Marius Olsen í Stephanssons Húsi**

UMMÆLI
*Kinna Poulsen*

Listaframsýningarnar í Stephanssons Húsi á Kongabrúnni í Havn hava higartil verið rættiliga ójavnar av góðsku. Men fleiri av hesum smáu framsýningunum, sum tað hevur eydnast gallaríeig-aranum Ingvør Nolsøe at fáa í lag, hava veruliga veitt áskoðaranum eksklusivar og framúrskarandi listaupplivingar. Hetta er galdandi fyri til dømis framsýningina við tekningum hjá Torbjørn Olsen, ta seinastu við myndum hjá Tróndi Patursson og framsýningina, ið nú hongur á gallarínum við myndum hjá Mariusi Olsen.

Tað er ikki ofta, vit hava høvi at síggja eina serframsýning við Føroya fremsta grafikara. Og hóast bert sløk helvtin av teimum 19 framsýndu prentunum eru nýggj, kann viðmælast øllum at fara at hyggja at hesi lítlu perlu av eini framsýning, sum sambært Ingvør Nolsøe verður hangandi fram til Heystframsýningina (27. september).

### Bohemekendar listafólkalýsingar

Myndirnar hjá Mariusi Olsen eru figurativar lýsingar av býar- og bygdaløgum, landsløgum og fólkum. Viðvíkjandi myndevni er Marius Olsen sostatt ikki nógv øðrvísi í mun til fleirtalið av listafólkum í føroysku listasøg-uni. Í fleiri av hansara myndum hómast hansara egna andlit í sjálvsævisøguligum lýsingum av viðurskiftum við eitt nú kvinnur og rúsdrekka.

Evnisøkið við tílíkum bohemekendum listafólkalýsingum og teirra plágaðu lagnu kenna vit aftur frá modernismunnar vøggu, og kundi hetta bent á, at hesar myndirnar eru myndevnisliga avoldaðar. Beint tvørturímoti tykjast myndirnar hjá Mariusi Olsen sera nútíðarligar, eins og myndevnið fer fram her og nú, og hetta er galdandi bæði fyri hansara nýggju og gomlu myndir. Henda kenslan av nútíð hevur sum so einki at gera við teir staklutirnar, ið síggjast á summum myndum, til dømis strikukotur, sjónvarpsskíggjar ella digitalur, sum jú bara verða sæddir sum nútímans í eitt avmarkað tíðarskeið. Tað er meira huglagið í myndunum, mátin tær eru hugsaðar og settar saman og mátin, sum tær brenna seg fastar í okkara fatan, ið ber boð um, at hetta eru modernaðir klassikarar, sum støðugt tykjast viðkomandi og gera áskoðaranum mun.

### Avbyrging og einsemi

Um vit samanbera eina av landslagslýsingunum hjá Mariusi Olsen við tær hálvabstraktu, ekspressivu landslagsmyndirnar í meginrákininum í føroyskari list, sæst beinanvegin hvussu egin Marius Olsen er. Hansara myndir tykjast fyrst og fremst nógv friðarligari og meira inntonktar samanborið við tað meira vanliga útvenda og dynamiska úttrykkið. Stilla og kensluborna huglagið minnir í støðum um myndirnar hjá Steffani Danielsen, sum eisini í støðum geva somu nøtrandi kenslu av avbyrging og einsemi, at listamaðurin stendur uttan fyri vindeygu og hurðar og málar hitan innanfyri.

Í myndunum hjá Mariusi er sorgblídni sostatt ein afturvendandi kensla, men huglagið kann skifta frá mynd til mynd frá tí turrisliga skrásetandi til tað speiska ella náttúruekstatiska í einastandandi vøkrum violettum og gulum landslagslýsingum, hvørs sansaliga megi er skelkandi ógvuslig. Viðvíkjandi forminum tykjast allar hesar myndirnar sera stýrdar av listamanninum, sum veruliga er grafikari við stórum G, á sama hátt sum eitt nú Elinborg Lützen var grafikari.

### Metalist – list um list

Marius Olsen hevur eitt heilt serligt hegni til grafiska foreinkling, sum í støðum minnir um plakatlistina hjá franska listamanninum Henri de Toulouse-Lautrec, ella japansku træskurðirnar hjá til dømis Hokusai og Hiroshige, sum inspireraðu Toulouse-Lautrec og fleiri onnur listafólk í síðstu helvt av tjúgundu øld. Í staðin fyri at brúka kopar, træ- og linoliumplátuna ella litografiska steinin eins og eitt lørift, tykist Marius Olsen sera tilvitaður um júst teir serligu úttryksmøguleikarnar, sum grafikkurin hevur í sær.

